## VIÐMERKINGAR

# Tinganes í coma



**HERGEIR NIELSEN**
Løgtingsmaður

**– Tá alt virksemi løgmans er leyst av skipaðum mannagongdum, hevur umsitingin í Tinganesi úr at gera við at framleiða løgfrøðiligar grundgevingar fyri mistøkum hansara, heldur Hergeir Nielsen, løgtingsmaður**

Í tí seinasta notatinum frá 9. jan. 2006 verður leitað eftir øllum hugsandi grundgevingum fyri, hví altjóða samfelagið við vold og makt skuldi kunnast um neyðtøkuna av føroyska samfelagnum, samstundis sum hetta skuldi dyljast løgtinginum.

Upplagt var jú, at løgtingið varð kunnað um hesa fráboðan, tá løgliga grundarlagið var fingið til vega undir sjálvari málsviðgerðini í vár, men so var ikki.

At lata løgtinginum hesa fráboðan undir viðgerðini, hevði sjálvandi elvt til óneyðugan iva og ørkymlan, og tí var frægast at tiga, meðan bundið varð niður á rættini.

Vit hoyrdu løggevaran Kallsberg siga, at tað hevði nú verið best, um tær føroysku viðmerkingarnar vóru sendar við til ST.

Fær man ikki tað man elskar, ja so elskar man tað man fær, var so radikala íkast hansara í tjóðskaparstríðnum hesuferð.

Í farnu viku hoyrdu vit løgmann siga, at landsstýrið í oktober 2005 fekk at vita, at Danmark fór at senda fráboðanina til ST.

Í gjár segði sami maður útvarpinum, at uttanlandsnevndin fekk hesi tíðindi longu 25. februar 2004.

Hetta er ósatt, og talan er beinleiðis um villleiðandi tíðindi fyri føroyska fólkinum, sum formaðurin í uttanlandsnevndini ikki eigur at hava sitandi á sær.

Nær og hvar landsstýrið fær síni tíðindi vita vit ikki, men uttanlandsnevndin fekk onga fráboðan 25. februar 2004, sum annars var annar dagurin eftir, at formaðurin í uttanlandsnevndini varð varpaður úr landsstýrinum.

Vit eru á einum vegamóti í tjóðaskaparstríðnum. Heimastýrisflokkarnir eru vorðnir fleiri, størri og sterkari, og tað eiga vit at fyrihalda okkum til.

Tað verður lumpað og lirkað sum ongantíð fyrr, og sjálvandi var fráboðanin til ST av stórum uttanlandspolitiskum týdningi, og tí eitt stýrisksipanarligt krav til løgmann, sama hvat frøðingarnir í Nesinum verða trýstir til at siga.

Í eini tjaksending í farnu viku segði løgmaður seg ikki hava góðtikið fráboðanina, hava mótmælt henni, og ikki hava tikið støðu til hana.

Kortini vartaði hann upp við og fegnaðist um hesa somu fráboðan um nýggjársleitið.

Tað hendir seg ferð eftir ferð, at løgmaður rótar stjórnarskipanarligu viðurskifti okkara upp í ein ellibita.

Lógirnar um altjóðarættarligar sáttmálar og yvirtøkulógirnar vóru skrumbladar ígjøgnum løgtingið á náttartíð, og skilið er hareftir.

Sáttmálin um vørufrælsi við Ísland varð als ikki lagdur fyri uttanlandsnevndina, og upp á fyrispurning hava vit fingið at vita, at løgmaður onga skrivliga tilráðing fekk til hetta brotið á stýrisskipanarlógina.

Hoyvíkssáttmálin er proppfyltur av álvarsligum mistøkum, og sleppur ikki snikkaleysur úr uttanlandsnevndini, og soleiðis kundu vit hildið áfram.

Sami løgmaður, sum vasssar í mistøkum fýrdi ikki fyri at taka løgtingsins formansskap av ræði, tá hann undan jólum fyriskipaði einum misáliti á sjálvan formansskapin, og sostatt eisini á løgtingið sjálvt.

Lúsingarnir til formannin í uttanlandsnevndini taka ongan enda, og nú er tað so løgtingsformaðurin, sum er farin at leggja rygg til.

Hví sambandsflokkurin letur allan hendan ágangin og alla hesa eyðmýkingina móti sær lynda, er ilt at skilja.

Hvussu leingi samgongumenn finna seg í hesum hurlivasanum, vita vit sjálvandi ikki.

Hóast bæði leikur og lærdur mótmælir, so kollrennir løgmaður politisku skipanina ferð eftir ferð við sínum óbúgvnu niðurstøðum.

Tann føroyska tjóðin saknar meira enn nakrantíð stundisligt umhugsni úr erva.

Tað stendur fast, at tað ikki varð kunnað nakrastaðni undir málsviðgerðini, at danska lógin skuldi kunnast ST.

Tvørturímóti, so varð upplýst, at danska lógin og donsku viðmerkingarnar ongan týdning høvdu fyri føroysk viðurskifti.

Heimastýrisflokkarnir løgdu dent á, at man var samdur um at verða ósamdur, og at føroyingar skuldu stýra eftir nýggju føroysku heimastýrislógini - meðan alheimurin hevur fingið eitt annað kort at stýra eftir.

»Góðan morgum, øksaskaft,« plaga danir at siga um tílíkan velling.

*hergeir@logting.fo*

# Nú kemur Vinyl La Republica

**Viva La Republica er prentað á vinyl og kemur í ávísar fløguhandlar í næstu viku, men longu leygarkvøldið ber til at ogna sær hana, tá 200 spælir útgávukonsert í Kagganum, við sær hava teir Marius**




*Nýggja Viva La Republica LP'in hjá 200 verður at fáa mánadagin*

**TÓNLEIKAÚTGÁVA**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fyrsta nýprentaða føroyska LP plátan í 15 ár kemur í teir betru fløguhandlarnar mánadagin, tað er útgávan Viva la Republica hjá 200, ið nú verður givin út í betri ljóðgóðsku enn nakrantíð áður, og sambært einum ljóðkønum, ið hevur lurtað eftir LP'ini, ljóðar hon fantastiska væl.

LP'in er framleidd í Týsklandi og er nú komin til Føroyar. Leygarkvøldið verður útgávukonsert í Kagganum. Har fer umframt 200, GBOB vinnarin Marius at spæla. Hetta eru tveir bólkar, ið eru í uppskoti til Planetina fyri besta bólk, umframt at Marius er í uppskoti til Planetina fyri besta nýggja bólk og Viva La Republica fyri bestu fløgu. Hetta skuldi sostatt verið ein konsert við føroyska rokk kreminum.

Konsertin verður leygarkvøldið eftir miðnátt. Á konsertini verður møguligt at keypa LP'ina, tveir dagar áðrenn hon kemur í handlarnar.

Viva La Republica fekk AME virðislønina fyri besta fløguhúsa, men tað er ikki bara ein endurgerð av hesum húsanum, ið prýðir LP'ina. Ístaðin hava Niels Arge Galán og Uni Árting gjørt ein heilt nýggjan húsa, ið eisini sæðst á myndini.

Rættiliga fitt av fólki hevur longu skrivað seg upp til LP'ina á heimasíðuni hjá 200, og tey hava fingið boð um hvussu tey fáa LP'ina longu í dag, um tey ynskja hetta.

Sjónarmið:

# Sjálvsavgerðarrættur – táta ella veruleiki



**JÓGVAN SUNDSTEIN**
Fyrrverandi løgmaður

**– Hvat hjálpir tað at kunna yvirtaka, at kunna gera uttanríkispolitiskar sáttmálar, og at vit hava rættin til sjálvi at avgera okkara stjórnaligu viðurskifti, um vit ikki gera nakað við tað, spyr Jógvan Sundstein, sum heldur, at tað nú ræður um at nýta tey amboð, sum vit hava, til praktiskan politikk**

Áhugavert hevur verið at fylgt við í orðaskiftinum um føroyskan sjálvsavgerðarrætt og donsku fráboðanina til ST um uttanríkispolitisku lógina og setningin um, at hetta er sambært sjálvsavgerðarrætt føroyinga.

Summi fólk eru dogmatisk, onnur eru pragmatisk. Tá ið eg sá orðaskifti í sjónvarpinum millum Høgna Hoydal og Jóannes Eidesgaard kom týðuliga fram, hvør var dogmatikarin og hvør var pragmatikarin. Vit kunnu eisini rópa tað teoretikarin og praktikarin, sjálvt um fyribrigdini ikki samsvara heilt. Men her sóu vit Høgna royna at gera alt ómøguligt út frá teoretiskum, dogmatiskum, juridiskum sjónarmiðum, meðan Jóannes royndi at vera tann, sum orðnaði alt á ein pragmatiskan praktiskan hátt. Eg skal viðganga, at tað seinra fellur mær betri, men kortini skal tað vera ein haldbarur rættarligur grundvøllur undir.

Sjálvandi er tað nakað juks, at uttanríkispolitiska lógin og yvirtøkulógin eru samtyktar í Føroyum og Danmark við ymiskum viðmerkingum, men tað er nú eina ferð gjørt. Eisini er danska fráboðanin send ST. Um møguleikin fyri eini supplerandi fráboðan frá føroyskari síðu er til staðar má so vísa seg. Tað hevði helst veri rætt at avgreitt tað.

Tað, sum nú ræður um, er, at nýta tey amboð, sum ein hevur, til praktiskan politikk og arbeiða út frá tí. Amboðini eru:

Ein yvirtøkulóg, sum gevur fríar ræsir (betur enn heimastýrislógin) til yvirtøku av øllum málum »líka til loysingina«.

Ein lóg um uttanríkismál, sum gevur ávísar uttanríkispolitiskar heimildir. Lógin er ikki fullkomin, men brúkilig.

Føroya fólk hevur sjálvsavgerðarrætt. Føroyingar lúka allar treytir fyri at vera ein tjóð bæði geografiskt, søguligt og etniskt. Føroyingar hava ongantíð limað seg inn í Danmark ella givið seg undir donsku grundlógina konstitutionelt. Heldur ikki við samtyktini av teimum báðum frammanfyri nevndu lógunum.

Sjálvsavgerðarætturføroyingar er staðfestur á hendan hátt:

Føroyingar eru sjálvir samdir í, at vit hava hendan rætt.

Danir, sum vit eru saman við undir sama kongi, hava staðfest og fráboðað, at vit hava hendan rættin. Hetta er gjørt í nevndu fráboðan til ST, men minst líka stóran týdning hevur tað, at allir danskir flokkar hava týðuliga og klárt sagt frá undir viðgerðum í danska løggevandi tinginum, (seinast undir viðgerðini av nevndu tveimum løgum), at føroyingar hava hendan rætt, og at tað vil verða respekterað um, og tá, føroyingar taka avgerðina um at stovna egið ríki.

Rætturin er fráboðaður alheimsfelagskapum.

Men hvat nyttar tað, at vit hava øll hesi rættindi, um vit ikki nýta tey. Hvat hjálpir tað at kunna yvirtaka, at kunna gera uttanríkispolitiskar sáttmálar, og at vit hava rættin til sjálvi at avgera okkara stjórnaligu viðurskifti, um vit ikki gera nakað við tað.

Politiskt hava menn sett sær fyri at gera Føroyar til besta land at liva í. Tó ikki fyrrenn í 2015, men tað er hóast alt ikki meira enn 9-10 ár. Men fyrsta fyritreytin fyri, at landið skal vera gott at búgva í, fyri ikki at tala um besta land, er, at landið og fólkið klárar seg sjálvt uttan varandi hjálp frá øðrum og er politiskt sjálvstøðugt.

Tað er tí avgerandi neyðugt at politiskar atgerðir verða framdar, sum skunda undir føroyskt fullveldi. Við frammanfyri nevndu amboðum ræður um skjótast gjørligt:

At niðurskriva blokkstuðulin yvir eitt stytri áramál

At fremja allar yvirtøkur eisini yvir eitt stytri áramál

Síðani at fremja suverenitetsyvirtøkuna nakað áðrenn 2015.

Um tað skal ganga við somu ferð sum higartil, so verður 2015 ikki nakað søguligt minnisvert ár.

*sundstein@mail.dk*